Oddaliðini halda fast

Í Bridge vórðu trý umfør í liðkappingini leikt um vikuskiftið, og í fyrstu deild tykjast ongar stórar broytingar at vera ávegis

BRIDGE
Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen

Trý tey fyrstu umførini í FM kappingini fyri lið vórðu leikt í Bridgehúsinum í Havn um vikuskiftið. Í 1. deild vóru ikki nógv óvæntað úrslit.

Liðini, sum tey seinastu árini hava dominerað føroysku bridgekappingarnar, sýnast at halda fram við hesum.

Tey bæði liðini, sum fluttu upp í fjør, taptu allar sínar dystir, og fáa tað eftir øllum at døma torført í vetur. Men enn er nógv eftir av kappingini, so hvør veit?

Úrslit 1.deild

Allan Dal-Christiansen — Hanus Bærentsen	25-00
Junior Buss Taxa — Carl Mikkelsen	15-15
Símin Lassaberg — Jóna Grunnveit	25-03
Jóna Grunnveit — Allan Dal-Christiansen	06-24
Junior Buss Taxa — Símin Lassaberg	18-12
Carl Mikkelsen — Hanus Bærentsen	18-12
Allan Dal-Christiansen — Carl Mikkelsen	25-00
Jóna Grunnveit — Junior Buss Taxa	00-25

Hanus Bærentsen — Símin Lassaberg 07-23

Støðan í 1.deild

1. Allan Dal-Christiansen	74 stig
2. Símin Lassaberg	60
3. Junior Buss Taxa	58
4. Carl Mikkelsen	33
5. Hanus Bærentsen	19
6. Jóna Grunnveit	09

Í 2.deild gongur meira javnt á, og sær út til, at vit her fáa eina spennandi kapping. Liðið hjá Øssuri Winthereig liggur á odda eftir tey fyrstu trý umførini.

Úrslit 2.deild

Hallur Ellingsgaard — John Reid Skoralíð	23-07
Øssur Winthereig — Hans Egil Joensen	20-10
Danny Transport — Álvur Klakk	13-17
Jórun Johannesen — Eyðun Jakobsen	18-12
Hans Egil Joensen — Hallur Ellingsgaard	14-16
Álvur Klakk — Øssur Winthereig	12-18
Eyðun Jakobsen — Danny Transport	08-22
John Reid Skoralíð — Jórun Johannesen	06-24
Hallur Ellingsgaard — Álvur Klakk	18-12
Øssur Winthereig — Eyðun Jakobsen	23-07
Danny Transport — John Reid Skoralíð	15-15
Jórun Johannesen — Hans Egil Joensen	15-15

Støðan í 2.deild

1. Øssur Winthereig	61 stig
2. Hallur Ellingsgaard	57
3. Jórun Johannesen	56
4. Danny Transport	50
5. Álvur Klakk	41
6. Hans Egil Joensen	39
7. John Reid Skoralíð	28
8. Eyðun Jakobsen	27

Sunnudagin var opin parakapping í Bridgehúsinum. 10 pør spældu við, og trý tey fremstu vóru hesi: (miðal = 108)

1. Kristina Ottosdóttir — Andras Róin	130
2. Henriette Svenstrup — Oddmar Danielsen	127
3. Hallberg Arnfríðsson — Heðin Mortensen	124

Tey næstu umførini í FM liðkappingini verða spæld í Eysturoynni í februar. Enn er ikki avgjørt, hvar spælt verður. Enn er ikki ov seint at tekna seg til steypakappingina fyri lið. Ring til Marjun Restorff tel. 31 91 42, um tit ætla tykkum við.

EBL Simultan kappingin

Simultan kappingin, sum europiska bridgesambandið skipar fyri á hvørjum árið, verður spæld í Føroyum mánakvøldið 26. november í Bridgehúsinum í Havn og mikukvøldið 28. november norðuri í Klaksvík.

Tekning til kappingina í Havn er hjá Marjun Restorff. Til kappingina í Klaksvík kunnu fólk tekna seg hjá Oddi Fjallsbak tel 45 60 27.

Bridge

Spølini, sum spæld verða í FM kappingini, eru givin við teldu. Tað vísir seg, at korthendurnar tá ofta gerast sera skeivar, og úrslitini av tí sama óvanlig og løgin. Vit skulu her síggja eitt av spølunum frá kappingini í 1.deild.

E/NS

Norður
Sp 1098762
Hj 8
Rú 963
Kl 986

Vestur
Sp KJ53
Hj Q953
Rú —
Kl KJ532

Eystur
Sp —
Hj KJ10764
Rú 874
Kl AQ104

Suður
Sp AQ4
Hj A2
Rú AKQJ1042
Kl 7

Suður hevur eina avbera sterka hond, 20 hp og ein gangandi 7 lit í rútara. Men við borðið vóru tað EV, ið gjørdu mest um seg. Vit skulu síggja, hvussu meldini gingu við tvey av borðunum:

V	N	E	S
Heðin	Steingrím	Jóannes	Hanus
Mouritsen	Weihe	Mouritsen	Bærentsen
- -	1hj	4ut*	
5hj	pass	6hj!!	D!!!
pass	pass	pass	

4ut spyr eftir essum. Pass frá makkaranum merkir, at hann einki ess hevur, og tí var ikki ráðiligt hjá Sunnan at melda 7rú. Men duplast skuldi, tað var so eingin ivi um tað!
Tá E-V vóru renonce í hvør sínum liti, vann 6hj lættliga. Við eitt annað av borðunum gingu meldini soleiðis:

V	N	E	S
Arnbjørn	Atli	Hans J	Jógvan
Sivertsen	Hansen	Petersen	Ranghamar
- -	1hj	D	
2ut*	pass	3sp**	5rú
5hj	pass	pass	D
pass	pass	pass	

2ut er Steens, sum lovar sterka hond við trumfstuðli og spyr um styrki og skap á hondini hjá makkaranum. 3sp lovar single ella renonce í spaðara. 5hjD við einum yvirstikki telur tó minni enn 6hj.

Amboðslið høvdu felagsvenjing

Fimleikarar og venjarar hugnaðu sær óført, tá felagsvenjing var í Havnar Fimleikafelag

FIMLEIKUR
Tíðindaskriv

120 børn og 12 venjarar vóru við til felagsvenjing hjá amboðsliðunum í Havnar Fimleikafelag

Sunnuudagin 28. oktober skipaði fimleikadeildin fyri innanhýsis felgasvenjing fyri amboðsliðini í Havnar Fimleikafelag.

Hendan felagsvenjingin var sett til 11. november, men av tí at gólvið í høllini á Stórheyggi skuldi skiftast, var hetta tiltakið framskundað.

11 lið við samanlagt 250 fimleikarum og 14 venjarum, kundu luttaka í felagsvenjingini, og uppmøtingin var heilt góð. 12 venjarar og 120 fimleikarar.

Felagsvenjingin gekk væl, og børnini stuttleikaðu sær óført. Byrjað varð við upphiting, ið Heini og Maria skipaðu fyri.

Luttakararnir sluppu at royna ymisk amboð, ið tey vanliga ikki nýta. Her kunnu nevnast ringarnir, barr, bummar og air-track. Tá tey professionellu venja í ringum og á barr stroyða tey magnesia á hendurnar, og hetta sluppu luttakararnir eisini at royna – og serliga stuttligt var tað at kunna geva herðaklapp, so rokið stóð frá.

Gekk væl

Undir venjingini vóru ymsar broytingar, so alt, sum upprunaliga var á skránni, varð ikki gjøgnumført.

Seks ymiskar amboðsbreytir vórðu settar upp, og fimleikararnir vóru býtti sundir í eins nógvar bólkar. Síðani skiftust bólkarnir um at venja á teimum ymsu breytunum.

Venjingin gekk væl, og hóast ein forleingjari til air-track maskinuna brendi saman, so kundi tað heldur ikki steðga venjingini. Ein mamma var skjót til húsa eftir einum nýggjum forleingjara, og so bar aftur til at venja á air-track maskinuni.

Í steðginum fingu børnini frukt og PopTop. Fruktin var stuðul frá p/f Poul Hansen og FK í miðbýnum, og MBM hevði latið PopTop drykkirnar.

Tey, sum skipaðu fyri, eru fegin um stuðul og hjálpina, sum foreldrini veittu.

Aftaná venjingina hugnaðu venjararnir, sum eru veteranar innan fimleikin, sær við at leypa á air track.

FM-róðrarnir ásettir

Nú er greitt, nær FM-róðrarnir í kappróðri verða komandi summar.

Tað vera sum vanligt seks róðrar, og byrjað verður á norðoyastevnu. Komandi ár verður fyrsti róðurin 1. juni, og tað er eina viku fyrri, enn tað var í ár.

Síðani verður róð á Skálafjarðastevnuni í Runavík 15. juni, á Sundalagsstevnuni í Hósvík 22. juni, á jóansøku í Vági 29. juni, á vestanstevnu í Miðvági 13. juli, og á ólavsøku 28. juli.

Seinni í ár fer aðalfundurin hjá Róðrarsambandinum at taka støðu til, um ein FM-róður skal vera afturat á hvørjum ári.

Um undirtøka er fyri hesum, so verður tað fyrstu ferð í 2002, og róðrurin verður á varmakeldustevnu í Fuglafirði 6. juni.

Nullloysn í Havn

Tveir týðandi dystir í triðja umfari í liðkappingini blivu leiktir í Havnini um vikuskifti, men einki lið fór heim sum vinnari. Í Danmark hava útisetarnir fingið flúgvandi byrjan í 2. deild.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Klassikarin millum Havnar Telvingarfelag og Klaksvíkar Talvfelag endaði við javnleiki 2-2. Havnarmenn, sum høvdu heimavøll, kunnu iðra seg mest, eftirsum teir høvdu støður til fleiri stig.

Undan dystinum vóru klaksvíkingar favorittar, men tá talan er um dyst millum hesi stórlið kann alt henda.

Á fyrsta borði vann Ólavur Simonsen eitt sera flott talv ímóti Martin Poulsen. Ein sonn perla, har Ólavur við hvíta fólkinum snøgt sagt niðurspældi Martin. Sigurin hjá Ólavi var hin einasti hjá klaksvíkingum sunnudagin.

15 ára gamli Olaf Berg vann hinvegin einasta talv hjá havnarmonnum. Hann vann eitt spennandi talv ímóti tí roynda Rana Nolsøe. Olaf fekk kroyst Rana í miðspælinum, men Rani bardi seg tó frían og leingi var javnt. Olaf helt høvdið kalt og tá Rani flutti skeivt var Olaf skjótur og vann trygt.

Á triðja og fjórða borði bjargaðu klaksvíkingarnir Steintór Rasmussen og Tummas M. Anthoniussen sær hálvt stig hvørt ímóti ávíkavist Herluf Hansen og Andrias Ziska. Klaksvíkingarnir vóru klárt við undirlutan, men fingu onkursvegna snýtt havnarmennirnar fyri hálva stigið.

2-2 er eitt gott úrslit hjá havnarmonnum hóast fyrimun til fleiri stig.

Komandi leygardag verður sannur toppdystur millum VT og KTF. IM John Rødgaard hevur gott tak á Ólavi Simonsen, meðan alt kann henda millum Torbjørn Thomsen og Rana Nolsøe, eins og við triðja og fjórða borði. Spurningurin er um Ólavur kann bróta ringu ringrásina ímóti Rødgaard. Talvið teirra millum verður helst eisini avgerandi í júst hesum dysti.

HT2 hjálpir KTF

Í Havn var toppliðið úr Vestmanna á vitjan í dysti ímóti næstbesta havnarliðnum í fyrstu deild. Vestmenningar megnaðu bert at fáa tvey stig burturúr ferðini til Havnar, og má tað sigast at vera sera óvæntað og skuffandi fyri teir. Ikki fingu havnarmennirnir á næstbesta liði nógvar møguleikar undan kappingarbyrjanini, men teir hava so sanniliga prógvað at teir møguliga kunna klára seg í fremstu deildini.

Fyrsta yvirraskilsi hendi tá Jóhan Gaard fekk ein góðan javnleik ímóti IM John Rødgaard. Rødgaard bjóðaði Jóhan javnleik tá hann í tíðarneyð stóð nakað verri, og Jóhan var skjótur at taka av tilboðnum.

Óli Joensen kláraði ikki uppgávuna ímóti Torbjørn Thomsen, og tapti ikki óvæntað ímóti sterka kollfirðinginum, sum hevur vunnið øll síni trý talv fyri vestmenningar í ár.

Johan E. Hansen hevði finnu meir í rókaendatalvi ímóti John Jacobsen á triðja borði, men rakk tað bert til ein javnleik. Jógvan Næs úr Havn hevur eisini óvæntað vunnið øll síni talv á fjórða borði. Sunnudagin vann hann á Kára Durhuus, sum óneyðugt misti finnu og tá var endatalvið lætt vunnið hjá Jógvani.

Saman við havnarmonnum kunnu klaksvíkingar fegnast um úrslitið, sum ger at støðan er tann sama í toppinum.

Tiger aftur í Føroyum

Kollfirðingar høvdu styrkt sær munandi um liðið ímóti hvalvíkingum. Svenski stórmeistarin Tiger H. Persson sum í mong ár hevur havt samband við Kollafjørð, var aftur at síggja á liðnum. Tiger telvar kring norðurevropa við ymsum liðum, eitt nú í Svøriki, Danmark, Týsklandi og eisini í Føroyum. Júst hetta vikuskifti hevur helst ligið væl fyri hjá honum í annars vælfylta kalendaranum at koma til Føroyar.

Tiger vann eisini sum væntað á Martini Brekká meðan Hans Kristian Simonsen, júst afturkomin frá HM í Spania, leikti javnt ímóti Finnbjørn Zachariassen á øðrum borði.

Eyðálvur Johannesen sum fyri tveimum vikum síðani vann á Martin Poulsen, vann aftur í triðja leikumfari, hesaferð á Sámal Christiansen. Bergur Magnussen vann sítt talv á fjórða borði ímóti tí unga Áranti Djurhuus.

Ein kærkomin kollfjarðasigur, sum hinvegin letur aftasta pláss til hvalvíkingar. Tiger verður valla við kollfirðingum hvørt umfar og tí verður tungt hjá teimum at blanda seg í toppin.

Støðan

VT	9 stig
KTF	8
HT	6 1/2
KT	4 1/2
HT2	4 1/2
TFS	3 1/2

Javnt í 2. deild

Runavíkingar hildu fast um endan í toppinum við 2-2 ímóti gøtumonnum. Við Bjarka Ziska á liðnum kunnu runavíkingar røkka langt.

Áhugaverdur dystur varð á Toftum har sandavágsmenn vitjaðu. Fyrrverandi føroyameistarnir Jens Kristian Hansen og Torkil Nielsen, sum mangan hava hitst yvir talvborðið, leiktu javnt á fyrsta borði, men dystin vunnu toftamenn 2 1/2-1 1/2. Triði dysturin í deildini varð millum vestmenningar og klaksvíkingar og hendan vunnu klaksvíkingar sera óvæntað 4-0. Útisetin Finnbjørn Vang hjálpti klaksvíksliðnum hetta vikuskifti.

Í 3. deild er líkt til at tey bæði havnarliðini, HT3 og HT4, fara at stríðast um uppflyting. HT4 hevur munin í løtuni, men eisini kunnu sandavágsmenn møguliga blanda seg í toppin. HT4 vann toppdystin 3 1/2-1/2 á Róki, sandavágsmenn vunnu trygt 3-1 á vestmenningum meðan kollfirðingar og HT3 býttu stigini.

Úrslit og støður

1. Deild

HT 2 - VT 2-2

Jóhan Gaard (1835) - IM John Rødgaard (2315)	0.5-0.5
Óli Joensen (1790) - Torbjørn Thomsen (2210)	0-1
Jóhan E. Hansen (1730) - John Jacobsen (1910)	0.5-0.5
Jógvan Næs (1715) - Kári Durhuus (1755)	1-0

HT - KTF 2-2

Martin Poulsen (2085) - Ólavur Simonsen (2235)	0-1
Olaf Berg (2040) - Rani Nolsøe (2185)	1-0
Herluf Hansen (2035) - Steintór Rasmussen (2090)	0.5-0.5
Andrias Ziska (1955)	
-Tummas M. Antoniussen (1965)	0.5-0.5

TFS - KT 1.5-2.5

Martin Brekká (2070) - Tiger H. Persson (2480)	0-1
Finnbjørn Zachariasen (2050)	
-Hans K. Simonsen (1965)	0.5-0.5
Sámal Christiansen (1850)-Eyðálvur Johannesen (1640)	0-1
Bergur Magnussen (1735)-Árant Djurhuus (1175)	1-0

Støðan eftir 3. umfar

1. VT, Vestmanna	9
2. KTF, Klaksvík	8
3. HT, Tórshavn	6.5
4. KT, Kollafjørður	4.5
5. HT 2, Tórshavn	4.5
6. TFS, Hvalvík	3.5

2. Deild

RT - GT 2-2

Bjarki Ziska (1805) - John Joensen (1750)	0.5-0.5
Brandur K. Jacobsen (1665)	
-Jákup F. Joensen (1715)	0.5-0.5
Henrik W. Joensen (1655)-Reinhold Isaksen (1710)	0-1
Eyðun Lamhauge (1625)- Kári Mørkøre (1155	1-0

VT 2 - KTF 2 0-4

Jákup á R. Andreasen (1655)-Finnbjørn Vang (1845)	0-1
Jón Mikkelsen (1655)-Óli Joensen (1655)	0-1
Jóan P. Johannesen (1465)-Esbern Christiansen (1610)	0-1
Ingolf Debes (1220)-Rani Tómasson (1145)	0-1

TT - ST 2.5-1.5

Jens K. Hansen (2165) - Torkil Nielsen (2080)	0.5-0.5
Helgi Joensen (1740)	
- Bernhard Augustinussen (1835)	0.5-0.5
Wensil Højgaard (1730)-Jónfinn Thomsen (1795)	1-0
Justines Hansen (1650) - Gutti Petersen (1630)	0.5-0.5

Støðan eftir 3. umfar

1. RT, Runavík	8
2. TT, Toftir	7.5
3. ST, Sandavágur	7.5
4. KTF 2, Klaksvík	5.5
5. VT 2, Vestmanna	3.5
6. GT, Gøta	3

3. Deild

Rókur - HT 4 0.5-3.5

Petur Sumberg (1635)-Jákup D. Joensen (1625)	0-1
Árni M. Dam - Jóannes Guttesen (1585)	0.5-0.5
Dánjal P. Olsen (1380) - Frants Eliasen (1470)	0-1
Archibald Andreasen (1305)-Herluf Mortensen (1325)	0-1

ST 2 - VT 3 3-1

Sonni Nielsen (1745) - Jógvan Egholm (1300)	1-0
Heri Christoffersen (1600) - Rógvi Hansen (1075)	0-1
Eivind Simonsen - Bárður Joensen	1-0
Ari Thomassen - Finnur Johannesen	1-0

KT 2 - HT 3 2-2

Niclas M. Joensen (1725) - Suni Ziska (1765)	0-1
Karl L. Johansen (1680) - Suni Jacobsen (1685)	0-1
Hans Petur Joensen (1655) - Jón Andreasen (1610)	1-0
Alvin Joensen (1640) - Ronny í Lon (1440)	1-0

Støðan eftir 3. umfar

1. HT 4, Tórshavn	7.5
2. HT 3, Tórshavn	7
3. ST 2, Sandavágur	6.5
4. Rókur, Oyri	5.5
5. VT 3, Vestmanna	4.5
6. KT 2, Kollafjørður	4